DAGSINS MEINING

Dupultskattaavtalur og nýggj runda

Nú um dagarnar frættist, at bretskir skattamyndugleikar eru tilreiðar at tosa við okkum um eina dupultskattaavtalu. Hetta eru góð tíðindi, nú tað áður hevur ljóðað, at tað fór ikki bara at vera sum at siga tað at koma á tal við bretar um henda spurningin.

Tað var m.a. formaðurin í áhugafelagnum hjá oljufeløgum, sum leita eftir olju og gassi undir Føroyum, sum á eini oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum kom fram við hesum málinum og vísti á ónøgdina í sambandi við skatting av fólki, sum vóru her í oljuørindum, at hesi blíva skattað frá fyrsta degi her. Hann helt fyri, at Fíggjarmálaráðið og táverandi landsstýrismaðurin høvdu ikki viðgjørt málið við nóg stórum álvarssemi. Eftir samgonguskiftið hevur so nýggi landsstýrismaðurin tikið málið uppaftur og má sigast, at arbeitt hevur verið skjótt og væl, tí longu nú er svar komið úr Bretlandi, um at man er sinnaður at taka málið upp. Tað er so bara at vóna, at nakað ítøkiligt fer at henda í málinum, tí ein dupultskattaavtala vil vera til stóran fyrimun fyri allar partar og loysa teir trupulleikar, sum eitt nú umboð fyri oljuvinnuna hava víst á. Uttan iva hevur maður okkara í London sín lut í, at tað nú er komið gongd á.

Um hesa tíðina verður so eisini uppskot fyri 2. útbjóðing lagt fyri tingið. Áhugavert verður at frætta, hvussu tað sær út, tó at vit gita, at tað fer at líkjast nógv tí uppskoti, sum varð lagt fram á sinni undan 1. útbjóðing. Men tó verður áhugavert at vita, hvøjrar broytingar eru gjørdar og hvørji øki vera við í útbjóðingini. Ein má ganga út frá, at økið, sum verður boðið út, helst fer at líkjast tí, sum oljufeløgini herfyri vístu á í nominatiónini.

Spurningurin er so, hvat vit kunnu vænta okkum av eini nýggjari útbjóðing. Ein kann siga, at hon kemur í eini ikki alt ov hepnari tíð, tá útbjóðing er í øllum grannalagnum eisini, ein er í bretskum øki, ein í norskum og entá ein í Grønlandi eisini. Spurningurin er, um oljufeløgini hava orku og vilja til at bjóða bæði her hjá okkum og so í grannalagnum eisini. Men vit mugu so bara vóna, at útbjóðingin er so mikið áhugaverd, at oljufeløg fara at taka ímóti henni við opnum ørmum. Einki er at ivast í, at tað er sera umráðandi at fáa verandi og onnur oljufeløg til at halda fram við leitingini eftir olju og gassi á landgrunninum. Tað ringasta, sum kann henda, er, um vit líða somu lagnu sum Írland og Falkslandsoyggjarnar og lutvíst Grønland, har tað fyrst vóru boraðir fleiri brunnar fyri síðani at steðga heilt upp. Tað ræður um at halda momentum. Og tí seta vit okkara álit á, at Oljufyrisitingin hevur dugað og fer at duga at marknaðarføra tey nýggju økini. At miðvís marknaðarføring skal til í slíkum máli eisini er eingin ivi um.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Tað sum sjálvstýri gevur

Aftursvar til Erling Simonsen

Jógvan Jacobsen

Erling Simonsen biður um aftursvar og her er tað.

Hvat verður øðrvísi við sjálvstýri spyr Erling Simonsen. Hann fórir m.a. fram, at hann ger sum hann vil og at makthavararnir gera tað sama.

Í løtuni hava landsins politikkarar, makthavararnir, tveir harrar, Føroya fólk og donsku stjórnina. Tveir harrar, sum hava mótstríðandi áhugamál. Gera føroyingar ikki sum danska stjórnin vil, kann tað fáa avleiðingar fyri danska studningin til Føroya. Tað ber ikki til at tæna tveimum harrum.

Harvið er núverandi skipan, heimastýrisskipanin, korrupt. Føroyingar kenna seg kroystar at stuðla donskum áhugamálum og harvið at misrøkja føroysk. Henda korrupta heimastýrisskipanin hevur m.a. við sær, at korruptión verður góðtikin í føroyska samfelagnum. Og hetta fær ræðuligan fylgjur fyri samfelagið og vanliga føroyingin. Tak t.d. studningsbúskapin í 80-árunum. Korruptión av fúlasta slag og vanligi føroyingurin var taparin.

Erling Simonsen skilur kanska nú, at føroysku makthavararnir ikki eru so frælsir, sum hann førir fram. Føroyskir makthavarar eru beinleiðis bundnir niður av donskum pengum og áhugamálum. Á dett frælsi.

Tá vit fáa sjálvstýri er eingin blokkur longur. Eingir danskir pengar at binda føroyskar politikkarar niður við og eingin grund hjá føroyingum at góðtaka korruptión longur. Eitt munandi frælsari samfelag eftir mínum tykki.

Men við fullum sjálvstýri kemur eisini rætturin hjá føroyingum at taka lut í t.d. altjóða kappingum.

Sum borgarar í sjálvstøðugum fullveldisríki sleppa føroyingar, á sama hátt sum borgarar í øðrum fullveldisríkjum, at taka lut í t.d. Olympisku leikunum. Føroyingar sleppa at umboða sína egnu tjóð á aðrar tjóðir. Einki er at ivast í, at hetta hevði verið føroyskum ítróttarlívi til stórt gagn.

Sum borgarar í Føroyska fullveldisríkinum hava føroyingar fullan rætt til at taka lut í t.d. Eurovision Song Contest. At umboða sína egnu tjóð og kappast á jøvnum føti við umboð fyri aðrar sjálvstøðugar tjóðir. Eg ivist ikki eina løtu í, at føroyingar hava stóran møguleika at vinna hesa stóru tónleikakappingina. Hetta hevði gagnað føroyskum tónleikalívi nógv.

Rætturin at taka lut í hesum og øðrum kappingum er sjálvsagdur eftir at føroyingar hava loyst og skipað egið fullveldisríki. Og føroysk umboðan í so stórum altjóða kappingum hevði gagnað føroyskum vinnilívi nógv. Men tað sleppa vit illa í dag. Sum er kunnu føroyingar, um teir sleppa ígjøgnum nálareygað, sleppa at umboða eina fremmanda tjóð. Men nálareygað er lítið. Núverandi skipan virkar ikki mennandi, men heldur sum vilja sleppa at menna seg t.d. innanfyri ótrótt og tónleik.

Samanumtikið hevði fult sjálvstýri gagnað føroyskum vinnulívi, ótróttarlívi og tónleikalívi nógv. Núverandi skipan virkar darvandi og afturhaldandi.

Men um Erling Simonsen heldur vil selja seg og sínar landsmenn fyri tveir pakkar av grønum keks um dagin stykkið, og liva í einum korruptum samfelagi við fólkaræðisligum undirskoti, sum harafturat virkar darvandi fyri ítróttarfólk og tónleikarar, so hann um tað. Eg vil ikki.

Eg vil liva í einum frælsum Føroyum. Og tað kunnu vit øll, um vit vilja. Tað snýr seg bara um viljan.

Við frælsiskveðu,

p.s. Orðini "Sjálvstýri er frælsi" er ikki mín egna meining, men mín tulking av orðum Jóannesar Eidesgaardar. Eftir mínum tykki eru sjálvstýri og frælsi hvørt sítt hugtak við hvør sínari merking. Hugtøkini hanga tó tætt saman.

Kjakfundur um stýrisskipana

KJAKFUNDUR
Tíðindaskriv

Í kvøld, fríggjakvøldið, skipar Føroyskt Lógar Rit fyri almennum kjakfundi á Vertshúsinum í Havn. Heitið á fundinum er:

Stýrisskipan, valskipan og fólkaræði

Pallborðsluttakararnir legga fyri við uppleggum sum grundarlag fyri kjakinum.

Við pallborðið sita:
Sjúrður Rasmussen, løgfrøðingur
Malan Jóhansen, búskaparfrøðingur
Sigmundur Ísfeld, stjórnarkønur
Orðstýrari er Birta Biskopstø.
Eftir kjakfundin spæla Jónas og Eyðun.

Guitar og fiólkonsert í Orfeus-røðini

KONSERT
Tíðindaskriv

Orfeus: Næsta klassiska konsertin í Orfeus-røðini verður 1. apríl, tá ið Monica Stauss Joensen og Ólavur Jakobsen fara at spæla verk fyri ávikavist fiól og guitar.

Hendan Orfeus konsertin verður merkt av italskum tónum og verk verða leikt eftir m.a. Tartini, Giuliani og Paganini, ið bæði var frálíkur guitar- og fiólleikari.

Umframt italska tónleikin, eru eisini smærri verk á skránni. Tónleikur eftir Villa-Lobos úr Brasilia, Czardas úr Ungarn, og skemtiligur og lættur tónleikur eftir William Kroll, verður at hoyra.

Monika og Ólavur fara eisini at framføra hvør sítt soloverk á ávikavist violin og guitar. Monika leikar verk skrivað til hennara av amerikumanninum Frédéric Balazc, meðan Ólavur vendir sær til italska úrmælingin Mauro Giuliani, og framførir eitt av hansara tórforastu verkum.

Konsertin verður í Klingruni 1. apríl klokkan 20.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Útlendsk ítróttarfólk

Eivind Jacobsen
Form. HSF

Seinastu vikuna hevur nógv verið tosað um útlendsk ítróttarfólk í Føroyum. Nógvar ymiskar upplýsingar er komnar fram. Fyri at lýsa málið betri verða hesar reglur settar á prent.

Nú í nógv ár hava ítróttarfeløg styrkt seg við útlendskum leikaraum. Hetta byrjaði fyri minst 25 árum síðan. T.d.leikti David Jones við ÍF í 1979. Fram til 2001 hevði eingin nakað ímóti hesum. Fram til 2001 høvdu ítróttarfólk í praksis frítt at koma til Føroyar. Einasta treytin var játtan frá arbeiðsgevara um arbeiði fyri eina løn, sum var á hædd við eina arbeiðsmannaløn. Hóast hesar sera liberalu reglur var eingin innrás av útlendingum.

Í 2001 kendi Bjarni Djurholm seg noyddan at broyta mannagongdina viðvíkjandi arbeiðsloyvi til útlendingar. Arbeiðsloysi var sera lágt og nógvir útlendingar vóru í Føroyum. Meini eisini at okkurt úttalilsi frá lógreguni var um allar útlendingarnar, sum vóru í landinum.

Eingin visti tá við vissu, hvussu nógvir útlendingar vóru í landinum og var tað sjálvandi ein trupulleiki. Men nú skjótt 3 ár seinni er einki broytt. Eingin veit við vissu hvussu nógvir útlendingar eru í Føroyum. Hetta hóast allar umsøknir skulu umvegis Vinnumálastýri. Hetta er sera undarligt. Við øllum teldum vit hava í dag, átti hetta ikki at verið ein trupulleiki. Tað er púra burtur við at landsumsitingin ikki hevur tamarhald á hesum. Tað er sera biligt og púra burtur við at skylda upp á danskarar.

Broytta skipanin í Vinnumálastýrinum gjørdi, at áðrenn Vinnumálastýri gav sítt viðmæli til eina umsøkn um arbeiðsloyvi var kravt av arbeiðsgevaranum, at hann hevði spurt hjá ALS um føroysk arbeiðsmegi var tøk. Kundi arbeiðsgevarin prógva at hann hevði spurt hjá ALS og at eingin føroysk arbeiðsmegi er tøk, so viðmælir Vinnumálastýri vanliga umsøknini. Í praksis fylgir Udlændingestyrelsen altíð avgerðini hjá Vinnumálastýrinum. Arbeiðsloyvi er galdandi fyri 1 ár. Fyri at endurnýggja arbeiðsloyvi skal søkjast av nýggjum. Mannagongdin er tann sama, um talan er um umsøkjara, sum søkjur fyrstu ferð, ella um ein umsøkjari longu hevur arbeitt í stýri. Hetta er sera undarligt. Við øllum teldum vit hava í dag, átti hetta ikki at verið ein trupulleiki. Tað er púra burtur við at landsumsitingin ikki hevur tamarhald á hesum. Tað er sera biligt og púra burtur við at skylda upp á danskarar.

Broytta skipanin í Vinnumálastýrinum gjørdi, at áðrenn Vinnumálastýri gav sítt viðmæli til eina umsøkn um arbeiðsloyvi var kravt av arbeiðsgevaranum, at hann hevði spurt hjá ALS um føroysk arbeiðsmegi var tøk. Kundi arbeiðsgevarin prógva at hann hevði spurt hjá ALS og at eingin føroysk arbeiðsmegi er tøk, so viðmælir Vinnumálastýri vanliga umsøknini. Í praksis fylgir Udlændingestyrelsen altíð avgerðini hjá Vinnumálastýrinum. Arbeiðsloyvi er galdandi fyri 1 ár. Fyri at endurnýggja arbeiðsloyvi skal søkjast av nýggjum. Mannagongdin er tann sama, um talan er um umsøkjara, sum søkjur fyrstu ferð, ella um ein umsøkjari longu hevur arbeitt í eitt ella fleiri ár í Føroyum. Hesar treytir tryggja, at útlendsk arbeiðsmegi ongan møguleika hevur at taka arbeiði frá føroyingum. Nú arbeiðið í landinum minkar fer Vinnumálastýrið at frámæla at arbeiðsloyvi verða givin útlendingum. Vansin við hesum er at ítróttarfeløg missa møguleikan, sum tey annars hava havt í meira enn 25 ár, at brúka útlendskar leikarar.

Hvat tjena ítróttarfólk í Føroyum

Útlendingar, sum íðka ítrótt í Føroyum, tjena ikki nógvar pengar. Teir fáa eina samsýning sum kanska svarar til 2-4.000 um mánan. Onkur fær meira og onkur fær minni. Tað er avgerðandi neyðugt at hesi fólk hava eitt arbeiðið við síðuna av. Ítróttarfeløgini megna ikki at gjalda 10.000 pr. mána til leikarar. Tað ber til at finna útlendsk ítróttarfólk, sum vilja koma her og eru nøgd við minni løn enn hetta. Men ein treyt fyri arbeiðsloyvi er, at lønin er á hædd við eina arbeiðsmannaløn. Hendan treytin er rímulig, tí annars kann tað henda at vit fáa bíliga arbeiðsmegi til landið. Tað gagnar ongum og er til skaða fyri limirnar hjá Arbeiðsmannafeløgunum.

Serskipan fyri ítrótt er neyðug

Av tí at ítróttarfeløg ikki hava ráð at gjalda løn til leikarar verður úrslitið, um ikki at verið neyðugt hjá Jógvan við Keldu at lurta mest eftir teimum og minst eftir ÍSF.

Talan er ikki um flóttafólk, sum vit ongantíð sleppa av aftur við. Vit tosa um fólk sum skulu hava arbeiðsloyvi. Tey kunnu sendast av landinum nær tað skal verða. Tí er eingin trupulleiki.

Nógv tosa uttan at vita

Tað hava verið nógv úttalilsir at hoyrt. M.a. frá FA og HA. T.d. er nevnt at hækka áramálið soleiðis at tað skal taka 7 ár heldur enn 5 ár at fáa ríkisborgararætt. Tey áttu at vita at tað langt síðan er broytt og at treytin í dag er 7 ár. Hetta boðar ikki frá sakligum orðaskifti. Eisini er trupult at skilja at limir hjá FA og HA verða bólkaðir eftir um teir eru føroyingar ella útlendingar. Eg trúði at allir limir vóru lika. Men tá formenn kunnu útala seg um, at summir limir taka arbeiði frá øðrum limum er tað helst munur á monnum. Útlendingar koma sambært galdandi reglum bert um arbeiðsgevarar hava tørv á teimum. Tí áttu teir at havt somu rættindi sum øll onnur, meðan teir eru her. Meti at hetta minnur mest um rasismu.

Tað at arbeiðsgevarar taka útlendingar fram um føroyingar til arbeiðis eiga tey at tosa við arbeiðsgevararnar um. Kann verða at teir hava eina frágreiðing. Um teir ikki hava tað, hevur viðkomandi arbeiðsgevari ein trupulleika. Tað ber ikki til at tosa alment um trupulleikar uttan at leggja prógv á borið. Tað átti eisini at verið ein skylda at siga frá á rætta stað.

Heldur enn at koma við rasistiskum úttalilsum áttu FA og HA at arbeitt fyri sínum limum. Hetta tykir mær sum at hoyra línumenn tosa um troling á landleiðini fyri 10 árum síðan. Tað byggir einki land. Ímeðan vit sita hendur í favn og tosa og skylda upp á tey sum ikki skilja okkara mál og tí ikki kunnu svara fyri seg, fóru seinasta ár uml. 1000 arbeiðspláss óvirka av landinum. Men tað kostar sjálvandi atkvøður at tosa Ingeborg og Hans ímóti og tí kann ikki roknast við at nakar politikari torur at tala at.

Jógvan við Keldu sigur seg vilja herða reglurnar. Men Jógvan við Keldu hevur als einki gjørt. Somu reglur, sum settar vóru í gildi í 2001 eru í gildi í dag. Tí hevur Jógvan við Keldu ikki gjørt nakað sum helst. Og tað sum hann ætlar at gera er at linka verandi reglur. Hetta hóast at tann sum ætlandi skal fáa fyrimun av hesum, altso ÍSF, ikki tekur undir við hesum.

Bert spell at fjølmiðlarnir ikki eru meira vaks í hesum máli. Tað hevði forðað fyri at landsstýrismenn o.o. kunnu sleingja við pástandum, sum tæna egnum áhugamálum, hóast hald ikki er í teimum. Tað hevði eisini gjørt at ein saklig avgerð varð tikin. Líka mikið hvat tann avgerðin so hevði verið.

P.S. ÍSF og HSF kunnu sum ítróttarfelagsskapir ikki blanda politik upp í málið og noyðast at verða so sakligir sum til ber og kunnu tí ikki upplýsa á jøvnum fóti.

100 ára føðingardagur á Glyvrum

BLÁI KROSSUR
Tíðindaskriv

Komandi vikuskiftið 26. - 28. mars skipar Blái Krossur Føroya fyri árliga aðalfundinum, sum í ár verður hildin í missiónshúsinum á Glyvrum. Evnið fyri aðalfundin er »Blái Krossur Føroya 100 ár« í sambandi við, at tað í ár eru 100 ár síðani, at Blái Krossur festi rót í Føroyum. Og fyri at hátíðarhalda 100 ára føðingardagin, verður gjørt eitt sindur meira burturúr enn vanligt. Alt vikuskiftið verður skipað fyri nógvum áhugaverdum og spennandi tiltøkum, bæði fyri ung og eldri og Blái Krossur leggur dent á, at øll tiltøkini eru almenn, so øll eru hjartaliga vælkomin, bæði blákrosslimir og eisini blákrosslimir…

Ungdómsløta við pizza

Tiltøkini byrja longu friggjakvøldið kl. 20.00 við eini ungdómsløtu, har Torleif Johannesen talar, Jákup & Mariann syngja og filmur verður vístur. Seinni um kvøldið verður bjóðað til pizzabuffé v.m. Leygarmorgunin kl. 11.00 verður ein afturlítandi áhugatími, har Jóhs. Andr. Næs fer at greiða eitt sindur frá blákrossøguni. Eftir døgurða kl. 14.00 verður sjálvur aðalfundurin á skránni, har skráin verður smb. viðtøkum felagsins. Kl. 16.00 verður skipað fyri einum spennandi pallborðið, har evnið er "Rúsdrekkamentanin um 20 ár". Við pallborðið sita umboð fyri Bláa Kross, Fráhalds-ráð Føroya og Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri.

Veitsluduguð

Leygarkvøldið kl. 19.00 verður, sum nakað heilt serligt, skipað fyri einum spennandi veitslu-duguða í sambandi við, at Blái Krossur fyllir 100 ár. Á skránni verður bæði gaman og álvara m.a. fer Bergur D. Joensen, prestur at hugleiða um evnið "Kristintrúgv og sosialábyrgd", ymiskir sangbólkar luttaka við sangi og spæli, Jacob Højgaard fer at líta aftur á ymiskt, ið hann hevur upplivað sum blákrossari og Egil Olsen fer at skipað fyri undirhaldi.

Familjumøti við føðingardagsgávum

Sunnumorgunin kl. 11.00 verður gudstænasta við altargongd í Glyvra kirkju, har prestarnir Sverri Steinhólm og Meinhard Bjartalíð luttaka. Kl. 14.00 verður familjumøti - eisini í Glyvra kirkju - við luttøku av m.a. Annelisu Rasmussen, Anngelu og barnakóri. Øll børn fáa eisini eina spennandi føðingardagsgávu frá Bláa Krossi!!!

Hugnalig samvera

Tiltøkini í sambandi við 100 ára aðalfundin enda sunnukvøldið kl. 18.00 við hugnaligari samveru, har skráin eisini er fjølbroytt og spennandi: Nýggi aðalskrivarin í heimamissiónini Vagn Foldbo talar um evnið: "Guðs kærleiki til menniskju, okkara kærleiki til næstan". Frágreiðing um arbeiðið hjá Bláa Krossi verður framlødg saman við framtíðarætlanum og kór úr Leirvík luttekur. Sverri Steinhólm, landsnevndarformaður endar og innsavnan verður til blákrossarbeiðið.